# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 26. september 2006, kl. 19$^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Jákup Oluf Hansen, Pauli Trond Petersen, Øssur Christiansen, Jóhan Hendrik Hansen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari:** Jákup Durhuus.

---

Til viðgerðar fyri opnari hurð:

Jóhan Hendrik Hansen var ikki við til viðgerðina av máli nr. 123.

**Mál 123.**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd til fyrispurning frá **Jóhan Hendrik Hansen** um grundstykki frá kommununi. Spurt verður serliga um møguleikan fyri at keypa grundstykki matr. nr. 310r.
J. nr. 2005-359
Bygdarráðið hevur á fundi 22. mars 2005 samtykt at bíða við at selja matr. nr. 310r við tí fyri eyga at brúka økið til parkeringspláss.
Nevndin mælir til at broyta hesa samtykt og at selja Jóhan Hendrik Hansen matr. nr. 310r.

**Viðv. 123.**
Tilmælið einmælt samtykt.

Jóhan Hendrik Hansen komin aftur á fundin.

**Mál 124.**
Tilmæli frá Havnarnevndini til umsókn frá **Sp/f Siggert Nielsen** um keyp ella leigu av øki til verkstað/goymslubygning uppá umleið 400 m$^2$.
J. nr. 2005-352
Nevndin mælir til at ávísa Sp/f Siggert Nielsen leiguøki í grótbrotinum í Stóragerði.

**Viðv. 124.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 125.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Sp/f RN Maskinverkstaður** um leiguøki og byggiloyvi til virkisbygning á havnarøki.
J. nr. 2005-165
Nevndin mælir til í samstarvi við Sp/f RN Maskinverkstað

- at byggja nýggja brandstøð uttanfyri maskinhøllina hjá kommununi.
- at Sp/f RN Maskinverkstaður yvirtekur verandi brandstøð, tá nýggja brandstøðin er liðug
- at Sp/f RN Maskinverkstaður fær loyvi til at víðka verandi brandstøð við hóskandi virkisbygningi.

**Viðv. 125.**
Tilmælið einmælt samtykt við ískoyti um, at nýggj brandstøð verður staðsett í samráð við Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið.

**Mál 126.**
Tilmælir frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini um **Niðara Veg** í samband við skriv frá **Maju Bourbiaa** um sethús hennara.
J. nr. 2005-008

**Viðv. 126.**
Eftir áheitan frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt at beina málið aftur í nevndina.

**Mál 127.**
Tilmælir frá somu í samband við gerðabýti við **Hjartvard Kjærbæk**, samtykt á bygdarráðsfundi 13. desember 2005.
J. nr. 2005-182
Tekniska Nevnd mælir til at, at játtaðar verða 350.000 kr til byggibúgving og ger av støði til verkstaðsbygning. Málið beint í Fíggjarnevndina at ávísa upphæddina.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku Nevnd, og at upphæddin verður játtað av kontu 700010: íløgur.

**Viðv. 127.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 128.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini til uppskot um **fíggjarætlan** fyri Vestmanna Kommunu fyri 2007.
J. nr. 2005-367
Nevndin mælir til at góðkenna uppskotið.

**Viðv. 128.**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin

Fundur lokin kl. $20^{30}$.

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Karl A. Olsen | Jón Mikkelsen | Jákup Oluf Hansen |
| Pauli T. Petersen | Øssur Christiansen | Jóhan Hendrik Hansen |
| Marjun S. Olsen | | |